# Skaðanevndin farin til verka

**Hvussu kundi tað henda? Hetta er stóri spurningurin, nú roykurin hevur lagt seg yvir útbrenda vrakið av BAe 146 hjá Atlantic Airways. Norska skaðanevndin er farin til verka.**

FLOGVANLUKKA
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*




*Skaðanevndin er farin til verka, og tað ger ikki uppgávuna lættari, at flogfarið er illa farið av eldi.*

Talan er um eina stóra avbjóðing hjá skaðanevndini, sum skal finna orsøkina til flogvanlukkuna á Stord, ið kravdi fýra mannalív. Og tað ger ikki uppgávuna lættari, at flogfarið er illa farið av eldi. Fyri norska blaðnum Dagbladet.no. greiðir ovasti verkfrøðingurin í norsku skaðanevndini, Kåre Halvorsen, frá um mannagongdirnar í slíkum málum.

– Tað snýr seg um, at halda øllum møguleikum opnum, og at vera til reiðar at melda skjótt og greitt, sigur Halvorsen við Dagbladet.no.

### Soleiðis arbeiðir skaðanevndin:

– Skaðanevndin metir um vanlukkuna, í mun til hvat slag av flogfari talan er um og skipanir tess. Atlantic Airways flogfarið var av slagnum BAe 146, og er hetta eitt flogfar, sum í útgangsstøðinum er væl egnað til at lenda á stuttum banum. Í mun til onnur flogfør, hevur tað ongan motor, sum stuðlar uppundir, tá tað skal steðga, og tí hevur tað stóran týdning, at flogfarið hevur góðar aerodynamiskar og mekaniskar bremsur.

– Hetta fara vit at kanna gjølla, og vit vóna, at svarti kassin og ferðmátarin kunnu geva okkum okkurt svar, sigur Kåre Halvorsen.

### Svarti kassin funnin

Svarti kassin varð funnin nærhendis halanum á vrakinum og er sendur til kanningar í London. Ferðmátarin kann geva svar uppá, um skipanirnar á flogfarinum riggaðu, sum tær eiga og møguliga, hvat flogskipararnir gjørdu. Ferðmátarin vísir millum annað broytingar í ferðini, hydrauliktrýst, spoilarnir, luftbremsur og um flapsarnir eru settir til, greiðir Kåre Halvorsen frá.

Svarti kassin skrásetir alla samrøður millum flogskiparar og flogovastan.

– Tað skal nógv til, áðrenn ferðmátarin og svarti kassin taka skaða. Teir tola hita upp í 1100 stig í ein hálvan tíma, og eitt trýst á fleir 1000 G. Og halin, har boksirnar vórðu funnar, er ikki brendur, sigur Halvorsen.

Svarti kassin verður helst avgerandi fyri at staðfesta vanlukkuna í Stord. Av tí at stórir partar av vrakinum eru útbrendir, er ómetaliga torført at gera tekniskar kanningar.

– Í útbrendum vrakum er tað torført at fara inn í stýrihúsið at kanna allar innstillingar og gerðir. Flestu skipanir, so sum bremsur og undirstell, eru ofta illa farin av øllum hitanum, sigur Halvorsen.

### Trupulleikar fyrr

Báðir flogskipararnir yvirlivdu vanlukkuna, og tí kann skaðanevndin innheinta týðandi upplýsingar frá teimum. Skaðanevndin fer sjálvsagt eisini at avhoyra øll ferðafólkini.

Ein røð av løgnum hendingum hava verið við BAe 146, har eiturgass er likið úr motorinum og út í kabinuna og í stýrihúsið. Gassið hevur tá heilt ella partvíst doyvt flogskiparar og flogternur. Dagbladet. no hevur havt eina umfatandi greinarøð, har fokus varð sett á málið um eiturgass í kabinu og stýrhúsi. Táverandi virkandi leiðarin fyri skaðnevndina, Grete Myhre, at hetta eisini fer at verða kannað í sambandi við vanlukkuna í Stord..

– Vit fara at gera kanningar um eitrandi gass, eisini hóast vit fáa aðrar orsøkir eru sannlíkar. Her kann vera talan um eina aftanfyriliggjandi orsøk. Blóðroyndir verða tiknar av teimum, sum vóru umboð, og royndir fara eisini at verða tiknar av vrakinum, sigur Grete Myhre við Dagbladet.no.

Seks persónar frá skaðanevnindini arbeiða á vanlukkustaðnum, og fáa teir hjálp frá tveimum bretskum havaríserfrøðingum, sum hava serligt innlit í júst hesum slagnum av flogførum. Eisini koma umboð fyri British Aerospace til Stord.

# Frágreiðingin kemur um nakrar vikur

**Ferðmátarin og upptøkutólið í vanlukkuflogfarinum verða kannað í Bretlandi í morgin, men frágreiðingin um orsøkina til vanlukkuna kemur ikki enn.**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen:*

*fartekst@mail.dk*

– Tað fer at taka drúgva tíð at fáa greiði á, hví flogfarið hjá Atlantsflogi fór út av breytini á Stord. Eg kann siga nakrar vikur, men tað kann væl vísa seg at taka uppaftur meiri tíð, sigur kanningarleiðarin hjá norsku skaðanmevndini, Birger Andreas Bull, við Stavanger Aaftenblad.

### Tvinnar orsøkir

Síðani vanlukkudagin hava serfrøðingar hjá skaðanevndini kannað sjálvan fløgvøllin og leivdirnar av tí uppkolaða flogfarinum. Á vøllinum hava teir millum annað kannað bremsusporini hjá flogfarinum, og tey hava avdúkað, at flogfarið ók eftir liðini, áðrenn tað fór útav. Tað kunnu teir staðfesta, tí sporini vísa, at vinstra hjól undir stýrihúsinum var vinstrumegin vinstra hjól á vinstra vongi. Sostatt er greitt, at flogfarið fór akandi eftir høgru lið, áðrenn tað fór av breytini.

Serfrøðingarnir siga, at hetta kann hava tvinnar orsøkir. Onnur er, at bremsurnar í aðrari síðuni virkaðu ikki, og at flogfarið tí fór eftir aðrari liðini, men tað kann eisini hugsast, at flogskiparin royndi at snara flogfarinum til vinstru fyri at forða fyri, at tað skuldi fara útav.

– Allir møguleikar eru opnir, og vit eru ikki komnir so langt, at vit kunnu byrja at gera nakra niðurstøðu enn, sigur Birger Andreas Bull. Hann leggur tó afturat, at skuldi tað hent, at kanningarnar avdúka okkurt, sum kann vera til ampa fyri trygdina á øðrum flogvallum, verða avvarðandi myndugleikar kunnaðir um tað beinanvegin.

### Bretska hjálp

Flogførini hjá Atlantsflogi eru bretsk. Einki tílíkt flogfar er í Noregi, og tí hevur norska skaðanevndin útvegað sær serkøna hjálp frá bretsku skaðanevndini í sambandi við kanningarnar. Tveir bretskir serfrøðingar komu til Stord longu vanlukkudagin, og teir eru har enn.

– Vit hava eitt sera gott samstarv. Teir bretsku serfrøðingarnir hava flogið við sama flogfari sum tað, ið fór útav, og teir hava fleiri flogfør av hesum slagnum. Teir kunnu tí svara nógvum spurningum, sigur Birger Andreas Bull við Stavanger Aftenblad.

Ferðmátarin og upptøkutólið úr vanlukkuflogfarinum vórðu send til Bretlands í gjár og skulu kannast í morgin.

# Flogførini eru trygg

**Aker Kværner leggur stóran dent á trygdina, og tað bleiv eisini gjørt, tá felagið gjørdi av at brúka Atlantsflog at flyta arbeiðsfólk, sigur aðalstjórin.**

Síðani vanlukkuna á Stord hava talsmenn hjá oljuarbeiðsmonnunum kært seg um, at teir hava ikki álit á flogførunum hjá Atlantsflogi, og at ov lítil dentur verður lagdur á trygdina. Men hetta er ikki so, skrivar aðalstjóri teirra í einum brævi til síni starvsfólk.

– Lat meg siga tað greitt og týðiliga: Vit góðtaka ongar neyðsemjur, tá tað snýr seg um trygdina. Okkara fólk flúgva allastaðni kring heimin, og vit vissa okkum um, at bæði feløgini og flogførini eru trygg, skrivar Martinius Brandal í brævinum til starvsfólkini hjá Aker Kværner.

Hann leggur afturat, at Aker Kværner hevur havt samband við donsku og norsku loftferðslumyndugleikarnar og Atlantsflog og fingið vissu fyri, at tað er trygt at flúgva við felagnum og tess flogførum.

Martinius Brandal skrivar eisini í brævinum, at Aker Kværner legði stóran dent á trygdina, tá felagið upprunaliga gjørdi sáttmála við Atlantsflog um at flyta arbeiðsfólk fyri seg.